Teir bjargaðu við Jøkulfelli:

# Hildu í hvørjum øðrum á opnum havi

**– Menninir, sum eg havi tosað við, siga, at Jøkulfelli legði seg eini 50 stig í einum og koppaði síðan upp á minni enn 5 minuttir, sigur Árni Dam, russiskur konsul í Føroyum**

SKIPSVANLUKKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Her koma teir bjargaðu sjómenninir í land av Vædderen mikudagin*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Alt bendir á, at farmaskipið, Jøkulfelli, sum mánakvøldið fórst í ein landnyrðing úr Føroyum, fekk slagsíðu og koppaði eftir heilt fáum minuttum. Hetta hevur gjørt umstøðurnar hjá teimum 11 monnunum, sum við vóru, ógvuliga truplar. Jøkulfelli sendi út eitt stutt og sjálvvirkandi neyðarkall, har trýst verður á ein knøtt. Síðan boðar skipanin sjálvvirkandi frá hvat skip, talan er um, og hvør positiónin er. Tað var hetta neyðarkallið, sum alt fyri eitt setti leitingina og bjargingina í verk.

Í gjár kom Vædderen á Havnina við teimum fimm monnunum, sum bjargaðir vórðu eftir herviligu skipsvanlukkuna – 4 estlendingar og ein russari.

Árni Dam, russiskur konsul í Føroyum, sigur, at bjargaðu menninir hava greitt frá, at Jøkulfelli legði seg eini 50 stig í einum og koppaði eftir minni enn fimm minuttum.

– Tíðin var ógvuliga knøpp, men sum eg havi skilt, sóu teir, sum vórðu bjargaðir, allar ellivu menninar, áðrenn teir fóru av skipinum. Teir sóu eisini teir fýra menninar, sum líkini eru funnin aftur av – og teir báðar, sum ikki spurdust aftur.

Árni sigur seg eisini hava skilt, at teir fimm, sum komu frá ræðuligu hendingini við lívinum, hildu í hvønn annan, meðan teir lógu á havinum og bíðaðu eftir bjargingini.

– Hvussu leingi teir hildu saman, veit eg ikki, men teir hava so roynt at havt samband við hvønn annan soleingi, tað hevur borið til, sigur hann.

Spurdur, um hann veit, um allir ellivu menninir sluppu í yvirlivilsisdraktirnar, áðrenn teir fóru av skipinum, sigur hann, at tað veit hann ikki við vissu, men hugsandi er, at onkur av manningini ikki hevur havt stundir til tess, áðrenn skipið koppaði.

Sosialurin skilti í gjár á Djóna Weihe, sum starvast hjá Sjóbjargingarstøðini MRCC-Tórshavn, at allir menninir ikki høvdu havt stundir at komið sær nóg væl í yvirlivilsisdraktirnar, og tí vórðu teir vorðnir vátir, kaldir – og deyðir.

### Góð hjálp

Árni Dam sigur, at tá ið teir fimm bjargaðu sjómenninir komu av Vædderen og niðan á Hotel Hafnia í gjár, var sálarfrøðingurin, Jegvan Bæk har eins og presturin, Meinhard Bjartalíð. Her fingu sjómenninir ta hjálp, sum sálarfrøðingurin og presturin kundi veita teimum.

– Sum russiskur konsul, hevði eg mest við russaran at gera, og hóast hetta er ein ræðulig vanlukka, haldi eg, at hann í neyðini og eftir umstøðunum hevði tað hampiliga gott. Men lagið var skiftandi, sum náttúrligt er, og maðurin var troyttur.

Árni sigur, at hann ætlaði at fáa russaran heim við sær mikukvøldið, men tað orkaði maðurin ikki.

– Eg vil takka føroysku myndugleikunum og løgregluni fyri stóra vælvild og forstáilsi undir slíkum umstøðum, sigur russiski konsulin og vísir á, at løgreglan altíð hevur verið at tosað við, tá ið brúk hevur verið fyri forstáilsi í sambandi við arbeiðið sum umboðsmaður í Føroyum, sigur hann.

At enda sigur Árni Dam, at arbeitt hevur verið við at fáa pappírini hjá bjargaðu monnunum upp á pláss, soleiðis at hesir kunnu sleppa heimaftur til familjur sínar í heimlandinum.

Av teimum fimm, sum yvirlivdu skipsbrotið, eru estlendingarnir ávikavsit 50, 30, 28 og 24 ára gamlir og russarin er 38 ára gamalur.



*Tað var her, einar 55 fjórðingar í ein landnyrðing úr Fugloynni, at Jøkulfelli fekk slagsíðu og koppaði eftir minni enn fimm minuttum. Krossurin vísir, hvør positiónin var, tá ið teir sendu út neyðarkall*

# Fiskiflotin: Sáttmáli ella sáttmálaloysi í dag

**– Tað er ikki við semingsstovnin, at semjan skal gerast, men millum feløgini, sum eru partar í málinum, sigur Terji Sigurðsson, semingsmaður, sum ásannar, at Føroya Skipara-og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag hava staðið rættiliga langt frá hvørjum øðrum í sáttmálaspurninginum**

SAMRÁÐINGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Í dag er greitt, um vit hava verkfall, verkbann – ella um sáttmálin millum Føroya Skipara-og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag er endurnýggjaður*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tað er torført at spáa um úrslit, sum endalig støða skal takast til eftir dead-line á bløðunum, men sum kortini eru avgjørd, tá ið blaðið er á gøtuni.

Soleiðis er við sáttmálatrætuni millum Føroya Skipara-og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag.

### Avgerð í gjár

Í gjár klokkan 14 skuldu feløgini svara semingsstovninum upp á nýggja semingsuppskotið, sum stovnurin legði fyri partarnar týsnáttina.

Fyrra semingsuppskotið varð vrakað av báðum pørtum fyri góðari viku síðan, og í gjár skuldi so hetta seinna semingsuppskotið standa sína roynd.

– Sjálvandi gera vit eitt semingsuppskot, sum vit vóna, at partarnir kunnu góðtaka, soleiðis at sleppast kann undan verkfalli ella verkbanni í fiskiflotanum. Men tað er ikki við semingsstovnin, at semjan skal gerast, men millum feløgini, sum samráðast um nýggjan sáttmála, sigur Terji Sigurðsson, sum fyrrapartin í gjár ikki vildi gera nakrar viðmerkingar til, um hann væntaði semju ella verkfall.

Hann vildi heldur ikki siga nakað um, hvat liggur í hesum nýggja semingsuppskotinum í mun til tað fyrra, sum bæði feløgini vrakaðu.

– Tað er ikki rætt av semingsstovninum at úttala seg um innihaldið, og vit hava eisini mælt feløgunum til at siga minst møguligt, soleingi samráðingar eru. Men skal nakað sigast um detaljurnar í stríðnum millum partarnar, nú roynt verður at finna semju, mugu tað vera feløgini sjálvi, sum gera tað.

### Gera støðuna upp

Terji segði fyrrapartin í gjár, at semingsstovnurin fór at gera støðuna upp, tá ið svarið hjá feløgunum fyrilá.

– Vit hava kallað samráðingarnevndirnar til fundar á Hotel Hafnia í dag klokkan 14, og vit hava einki á skránni í framhaldi av tí svari, sum feløgini koma við.

Hann sigur, at orsøkin til, at flotin ikki longu er lagdur orsakað av sáttmálatrætuni, er, at feløgini hava verið samd um, at sáttmálin heldur fram, meðan samráðst verður.

– Skuldi tað hent, at feløgini vraka semingsuppskotið í dag, er sáttmálaloysi – um feløgini ikki semjast um at gera eina nýggja avtalu og nýggja semingsroynd.

Terji sigur, at semingsstovnurin hevur brúkt tær heimildir, sum eru í lógini, og tað hevur verið ein treyt hjá stovninum, at sáttmálin heldur fram, soleiðis at samráðst hevur verið.

Spurdur, um tað kann hugsast, at annað felagið góðtekur semingsuppskotið, meðan hitt vrakar og kortini ynskir at samráðast víðari um onkrar detaljur, sum so kunnu loysa málið, um hesar fáast upp á pláss, sigur hann:

– Eg vil ikki avvísa nøkrum, og tað er upp til feløgini, um tey vilja halda fram, um so verður.

Terji Sigurðsson endurtekur, at semingsstovnurin hevði einki á skránni í framhaldi av tí, sum verður svarið hjá feløgunum klokkan 14 í gjár.

### Seming í trý ár

Terji Sigurðsson og Jóannes Djurhuus eru tilnevndir semingsmenn fyri privata arbeiðsmarknaðin frá oktober í 2004 at rokna – og trý ár fram.

– Jú, tað er stríggið at vera semingsmaður, tá ið træturnar eru torførar at loysa, sigur Terji Sigurðsson, sum ásannar, at rættiliga torført hevur verið at rokkið eini semju millum Føroya Skipara-og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag í hesum umfari.

Í skrivandi stund vita vit ikki, hvat hendi klokkan 14 í gjár, tá ið feløgini skuldu svara semingsmonnunum uppá seinna semingsuppskotið.